# ítróttur

Nr. 136 • mikudagur • 20. juli 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Eysturoyingur aftur best

*Eysturoyingur er nú aftur føroyameistari við tíggjumannaførum. Tað varð greitt eftir sigurin á vestanstevnu í Miðvági leygardagin*

*Mynd: Álvur*



**Tíggjumannafarsróðurin er avgjørdur í ár. Eysturoyingur er føroyameistari, og ongin fær tikið teir aftur**

TÍGGJUMANNAFØR


*Solby A. Eliasen*

*solby@sosialurin.fo*


Tann guli báturin úr Runavík legði best fyri og fekk stungið skutin fram um hinar bátarnar longu frá fyrsta takið. Oddasessurin hjá eysturoyingum var ongantíð í vanda, og teir vunnu sannførandi róðurin hjá tíggjumannaførunum leygardagin og harvið eisini føroyameistaraheitið, sum Eysturoyingur ikki hevur vunnið síðani seinast í níti-árunum, tá hann var suverenur í tvey ár. Eysturoyingur var leysur av hinum bátunum, tá hann kom á mál.

Ofta verður sagt, at tá róðrarteinurin verður styttur 1.000 metrar hjá tíggjumannaførunum, so kunnu úrslitini broytast. Tað gjørdust tey eisini hjá tíggjumannaførunum, men bara ikki sjálvur fremsti báturin. Nummar tvey hendan róðurin gjørdist Havnarbáturin, sum sostatt fekk heiðursmerki fyri fyrstu ferð í ár. Meistararnir frá í fjør hava havt eitt ivasamt ár, og fegnaðust uttan iva um framgongdina á vestanstevnu.

Nólsoyingur, sum vann norðoyastevnuróðurin, kom sum tann triðji báturin á mál og Hoyvíkingur rykti so eisini eitt pláss aftur á fjórðaplássið.

### 10 mannafør menn

1 Eysturoyingur 04:18.04
2 Havnarbáturin 04:22.11
3 Nólsoyingurin 04:24.00
4 Vágbingur 04:24.12
5 Hoyvíkingur 04:26.08
6 Skálabáturin 04:26.20
7 Vestmenningur 04:33.24
1G











*Havnarbátinum, sum kom á mál sum nummar tvey, fýra sekund framman fyri Nólsoying*

*Mynd: Álvur*



**Eyðfinn Bjarnastein rør við Eysturoyingi og situr á bógbekki í stýriborð:**

## Besta FM heiti

Hóast Eysturoyingur nú er føroyameistari, fara teir at halda fram í sama lag.

- Vit ætla okkum at gera tað sama og venja víðari, tí tað hevur nógv at siga at vinna Ólavsøkuróðurin. Vit undirmeta ongan, undirstrikar ein troyttur Eyðfinn Bjarnastein eftir róðurin í Miðvági.

Hann heldur, at styrkin hjá Eysturoyingi í ár er, at teir hava gott fólk, hava vant hart og trúgva upp á seg sjálvar.

Eyðfinn hevur vunnið føroyameistaraheitið við Tjaldrinum í 2000 og 2001, men hann er ikki í iva um, hvat er betri.

- Tað er nógv betri at vinna føroyameistaraheitið við tíggjumannaførunum. Tað er nógv stuttligari og eisini meira spennandi, sigur Eyðfinn Bjarnastein.

**- sae -**





**Magni Brøðraberg rør við Havnarbátinum, og situr í rúminum í stýriborð:**

## -Vit róu optimalt

Eitt av mest óvæntaðu úrslitinum á Vestanstevnu var, at Havnarbáturin endaði á øðrum plássi hjá 10 mannaførunum. Tað hevur gingið illa í hond í ár hjá Havnarbátinum, og báturin hevur nærum á hvørjum róðri endaður á fjóðra plássi. Seinastu vikurnar hevur manningin á Havnarbátinum lagt nógv fyri at venja 1000 metrar, sum er teinurin bæði á Vestanstevnu og á Ólavsøku.

-Vit avgjørdu fyri fleiri vikum síðan at leggja okkum eftir at venja 1000 metrar, tí vit snøgt sagt ikki høvdu neyðugu venjingina til at standa okkum á 2000 metrum. Út frá teimum fortreytum, at vit vórðu seint mannaðir í ár og vit harvið ikki eru líka væl fyri sum hinar manningarnar, kanst tú siga, at vit róu optimalt í dag. Alt riggaði hjá okkum í dag, sigur ein vælnøgdur Magni Brøðraberg.

Hóast annaðplássið á Vestanstevnu, megnaði Havnarbáturin ongantíð at hótta Eysturoying, sum endaði 4 sekund frammanfyri 10 mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag. Kortini er Magni Brøðraberg bjartskygdur undan ólavsøku.

- Eysturoyingur er sjálvsagt stórur favorittur at vinna á ólavsøku, men alt kann henda. Vit fara at gera okkara ítarsta fyri at geva teimum kapping, tí ein sigur á ólavsøku kann heilt avgjørt bjarga okkara kappingarárið, sigur Magni Brøðraberg.

**.páll**